STARVSLÝSING

**Umsóknarfreist**
**17. MAR**




# Koyrisamskipari til Faroe Ship

## Starvið

Saman við tveimum øðrum koyrisamskiparum skipar tú fyri allari koyring av vøru, sum Faroe Ship varðar av. Faroe Ship hevur í dag 31 bilar, sum koyra um alt landið við sera ymiskum flutningi. Títt samband er í høvuðsheitum við viðskiftafólk og bilførarar okkara. Arbeiðsstaðurin kann vera í Tórshavn ella í Runavík.

## Førleikakrøv

Vit leita eftir einum ágrýtnum, samvitskufullum og sjálvstøðugum fólki. Samstarvsevnir, yvirlit og áhugi fyri úrslitum hava stóran týdning.

## Lønarviðurskifti og umsóknir

Løn og arbeiðstíð verða eftir avtalu. Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum skulu sendast til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, 110 Tórshavn, att.: Jákup Christiansen.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jákup Christiansen á tlf. 349130 ella 230050.

Vit vilja seta starvið skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. mars 2008.

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Faroe Ship er flutningsfyritøka, sum saman við Eimskipafelag Íslands síðan 1. juli 2004 hevur myndað altjóða fyritøkuna Eimskip Group, ið er størsta flutningsfelag í Norðuratlanshavi, við egnum rutum til Evropa, USA, Baltalond og Ruslands.

Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency, vøruhotell og skundflutningsfyritøkan Faroe Express.

SENDISTOVAN